

tekur ímóti tí. Eg trúgvi ikki, at øll í Føroyum dáma tað, sum eg, Páll Finnur Páll ella Teitur gera. Tað snýr seg um at vera erligur ímóti sær sjálvum.

## ÁRSINS NÝGGI BÓLKUR 2009

Í septembur 2007 gjørdu Filip Mortensen og Urbanus Olsen av at gera ein nýggjan tónleikabólk. Filip var royndur tónleikari frammanundan, men Urbanus, hóast hann er kønur gittarspælari, hevði ongantíð áður verið við í einum tónleikabólki.

– Eg kendi Urbanus frá fyrr av, og vit hildu, at tað kundi verið stuttligt at farið í holt við onkrum. Tá vit byrjaðu, ætlaðu vit okkum at gera okkurt heilt banalt. Vit ætlaðu at skapa okkurt heilt simpult, sum eingin hevur gjørt fyrr. Vit ringdu tá til Pætur Zacharriasson at vita, um hann kundi hjálpa okkum at skipa fyri onkrari konsert í Gøtu, og tað kom so í lag. Tað vóru rættiliga nógv fólk, og øll vóru positiv. Eftir hesa konsertina, hevur alt bara koyrt, greiðir Filip frá.

Fremsta málið hjá nýggja tónleikabólkinum var at sleppa at framføra á G! Festivalinum, og hetta umframt nógv annað, eydnaðist teimum eisini.

– Eg trúgvi rættiliga nógv upp á tey tingini, sum eg geri, og eftir G!festivalin helt eg, at nú skuldu vit uttanlands. Urbanus var rættiliga krittiskur, flennir Filip. Longu áðrenn árskiftið slapp The Ghost at framføra uttanlands, fekk plátukontrakt í London og vann »Ársins nýggjasta bólk 2007,« á Planet Awards.

– Øll málini vórðu rokkin, langt áðrenn vit ætlaðu, sigur Filip bæði errin og bilsin.

– Heiðurin á Planet Awards var líkasum eitt herðaklapp, sum eg haldi, at øll hava brúk fyri inn ímillum.

### Hvør er »Ársins nýggi bólkur 2009«?

– »Analog Norð,« ið er nýggi bólkurin hjá Jan Rasmussen, Kristoffer Mørkøre, Henning Nicodemussen og Bartal Augustinussen. Tað er ein spildurnýggjur bólkur, og teir geva fløgu út nú hvørja løtu. Eg haldi, at fløgan er ordiliga góð. Teir hava gjørt alt sjálvir og hava uppiborðið eitt herðaklapp. At fáa eitt slíkt herðaklapp lyftir sjálvsálitið upp, og tað skal til viðhvørt. Eg haldi, at tað er tað einasta nýggja í Føroyum, sum eg síggi nakað ordiliga spennandi í. Men tað er sjálvsagt bara mín meining, endar Filip Mortensen.